# Megnaðu ikki at mynda

**ÍF miðvallarin Høgni Zachariassen ásannar, at hetta var ikki tað, sum teir høvdu ætlað, og hann gevur eitt nú tendringini skuldina**

ÍF
*Jóannes Hansen*

- So hava vit roynt at tapa í Formula deildini.

Tað er fyrsta staðfestingin, tá ið ÍF miðvallarin og ein tann mest eyðsýndi spælarin higartil í hesum kappingarárinum, Høgni Zachariassen, ger status eftir 2-0 tapið ímóti B36.

- Í sovornum førum er tað upp til okkum at mynda spælið á heimavølli. Tað megnaðu vit ikki, tá ið teir vóru so tættir í okkum, og so tykist tað sum um, at tendringin ikki verður tann, sum tað er alneyðugt, at hon er. B36 spælir seg til fleiri møguleikar, enn vit megna, og tað er ikki so nógv at siga til, at teir vinna. Men um vit høvdu dugað betur at gjørt nyttu burturúr møguleikunum, sum vit fingu, tá ið teir høvdu mist ein mann, so kundu vit kanska havt fingið eitt stig.

*Hvussu fer hetta at kennast í hesi vikuni?*

- Tað er nú, at vit skulu vísa, hvør dugur er í okkum. Vit skulu til Runavíkar. Teimum vunnu vit báðar dystirnar ímóti í fjør, og eg haldi, at tað er týdningarmikið, at vit reisa okkum aftur beinanvegin. Vit vistu, at vit eina ferð fóru at tapa. Tað var spell, at tað var á heimavølli, og at vit kanska eiga stóran lut í tí sjálvir, men soleiðis var tað, og nú mugu vit leggja hetta afturum okkum og hava fokus á næstu uppgávuni, heldur ÍF miðvallarin.

VB-GÍ 0-1 (0-1)

# Gøtumenn komu á talvuna

**Jónreid Dalheim skoraði fyri fyrstu ferð í landskappingini, og vágbingar noyddust enn eina ferð at staðfesta, at tað er trupult hjá teimum á heimavølli ímóti Eysturoynni**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*




Vágbingar hava tað trupult á heimavølli ímóti feløgunum úr Eysturoynni. Tað varð enn eina ferð staðfest sunnudagin. Í fyrsta umfarinum var ÍF í Vági, og tá fingu teir - á sama hátt sum teir gjørdu í steypakappingini - við 1-0 sigri fulla úrtøku.

Sunnudagin var GÍ í Vági, og teir fingu fulla úrtøku. Ímillum vitjanina av fuglfirðingium og gøtumonnum høvdu vágbingar roynt seg ímóti bæði klaksvíkingum og havnarmonnum, og báðu ferðirnar fingu teir væl burturúr. 1-1 í Klaksvík og 1-0 sigur og harvið full úrtøka ímóti trífaldu meistarunum.

Líkindini vóru einki serlig. Ivasamt var, um tað yvirhøvur bar til at spæla. Tað vóru teir ógvuliga ivasamir um sunnumorgunin, men eftir døgurða tóku teir avgerð um, at dómarabólkurin og gøtumenn skuldu ikki fara norður um aftur í øllum rullinum, uttan at teir høvdu roynt seg á vøllinum.

Gøtumenn høvdu nógva vindin undan í 1. hálvleiki. Tað bar illa til at fáa skipað fótbóltsspæl í lag, men báðir partar royndu. Bólturin var fyri tað mesta á tí partinum av vøllinum, sum vágbingar vardu, og onkrar vandamiklar støður stóðust í VB brotsteiginum.

Tá ið fyrra umfarið var knappliga hálvrunnið, fekk GÍ málið, sum í síðsta enda vísti seg at hava virði av trimum stigum. Einsamalla málið skoraði miðvallarin í høgru, Jónreid Dalheim, sum fyri tað mesta plagar at vera á beinkinum, men sum hesa ferð hevði fingið møguleikan millum teir fyrstu ellivu. Hetta var fyrsta málið hjá Jónreid í landskappingini.

Málið stóðst eftir uppspæl í vinstru og innlegg. VB verjan royndi at beina bóltinum burtur, men teir vóru so óheppnir, at teir løgdu hann eitt sindur út um brotsteigin og mitt fyri, har bæði Sámal Joensen, sum aftur hesa ferð var annar av álopsspælarunum, og Jónreid Dalheim vóru púra blankir. Jónreid takkaði fyri tilboðið og sendi bóltin í málið dygst úti við stólpan.

## Ferðin ikki stór

Eftir steðgin hevði heimaliðið vindin undan. VB hevði bóltin nógv meiri, enn gestirnir høvdu, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál.

Næst við at javna var fyrrverandi GÍ spælarin, Símun Samuelsen. Miðvallarin í vinstru hjá VB sendi bóltin í tvørtræið aftanfyri Hall Hansen.

VB hevði fleiri aðrar royndir, men tað var sjáldan, at GÍ maðurin noyddist at strekkja seg. Heldur var tað soleiðis, at vágbingarnir vóru óneyvir og sendu uppum og framvið málinum.

Tá ið VB fyri tveimum vikum síðani var í Klaksvík, illneitaðust klaksvíkingar um, at VB í 2. hálvleiki dugdi so væl at taka tað heilt róligt, tá ið teir skuldu avgreiða deyðbóltsstøður. Tá var ferðin lítil, tað gagnaði gestunum mest, og teir á heimaliðnum skúmaðu, so tað gekk út yvir teir sjálvar.

Júst soleiðis var tað í Vági sunnudagin. Men hesa ferð var tað GÍ, sum í 2. hálvleiki nýtti gomlu og væl kendu uppskriftina á útivølli. GÍ málverjin, Hallur Hansen, sá gult fyri at draga tíðina út, og vágbingar vóru ørkymlaðir, so tað kanska gekk út yvir teirra egna avrik.

Sum 2. hálvleikur leið flutti VB fólkið longri fram á vøllin, og gøtumenn løgdu størri dent á verjupartin. Súni Olsen var einsamallur á toppinum, og tað kundi tókst sum um, at eitt mál fór at koma, men VB megnaði ikki at bróta ígjøgnum, og so vóru gøtumenn nøgdir við tepra og sera týdningarmikla sigurin.å

## FAKTA UM DYSTIN

**VB-GÍ 0-1 (0-1)**
0-1: Jónreid Dalheim 19.
**Dómari:** Georg N. Rasmussen
**VB:** Bjarni Johansen — Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Michael í Lágabø, Kári í Lágabø (Jón K Poulsen, 88.) — Poul N. Poulsen, Evrad Ble, Milan Culic, Símun Samuelsen — Nenad Zivanovic, Dan Djurhuus
**Gult kort:** Kári í Lágabø, Evrad Ble
**GÍ:** Hallur Hansen — Hans Pauli Petersen, Atli Gregersen, Robert Rzeczycki, Hanus Jacobsen — Jónreid Dalheim (Sam Jacobsen, 89.), Símun Louis Jacobsen (Krzystof Popczynski, 69.), Sámal Joensen, Poul Henning Jacobsen — Súni Olsen, Poul Arni Jacobsen (Áslakur R. Petersen, 79.)
**Gult kort:** Poul Arni Jacobsen, Símun Louis Jacobsen, Hallur Hansen

# Trýstið tikið burtur

**GÍ venjarin heldur, at avrikini seinastu ferðirnar hava lagt upp til, at teir skuldu havt fingið fleiri stig enn tey trý, sum GÍ hevði við av Vágseiði**

GÍ
*Jóannes Hansen*

GÍ venjarin, Krzystof Popczynski, fjalir ikki yvir, at hann var ógvuliga lættur, tá ið hann í nógva vindinum seinnapartin sunnudagin fór av vøllinum, sum var fyrsti heimavøllurin hjá honum, tá ið hann fyri seks árum síðani kom til Føroya.

- Tað kann skjótt gerast ónd ringrás, tá ið stig ikki fáast burturúr, hóast avrikini hava verið góð. Í fyrsta umfarinum spældu vit illa ímóti EB/Streymi, og tá høvdu vit ikki uppiborið at fáa nakað burturúr. Ímóti KÍ og serliga í Fuglafirði haldi eg, at vit vóru óhepnir. Eg var í hvussu so er nøgdur við avrikini, og hesa ferð var eg nøgdur bæði við avrikið og úrtøkuna, sigur Popczynski, sum setti seg sjálvan á vøllin, tá ið seinna umfarið var gott og væl hálvrunnið.

*Roknar tú nú við, at tað fer at venda hjá tykkum?*

- Tað hevur í hvussu so er stóran týdning, at vit komu á stigatalvuna. Tað tyngir, tá ið einki fæst burturúr, og tað lættir, tá ið tað gongur væl. Nú skulu vit í Gundadal at spæla ímóti HB, og vit halda, at vit hava góðan møguleika at fáa stig og kanska at vinna ímóti teimum, heldur GÍ venjarin, sum rósar sínum monnum fyri at hava víst góðan hugburð í Vági.

# Vit mugu fáa gongd í málskjótingina

**VB venjarin heldur, at gongdin og úrslitini vísa, at teir hava tak á verjuspælinum, og at tað er málskjótingini, at tað er heilt galið við**

VB
*Jóannes Hansen*

Tað er eyðsýnt á støðutalvuni, hvør stóri trupulleikin hjá okkum er. Í teimum fýra ferðunum, sum vit hava roynt okkum í landskappingini, hevur stóri trupulleikin verið at skjóta mál.

Hetta er staðfestingin hjá VB venjaranum, John Christensen, tá ið hann ger viðmerkingar til avrikið og úrslitið á heimavølli ímóti GÍ.

-Vit kundu havt vunnið allar fýra ferðirnar, og vit kundu eisini havt tapt allar fýra ferðirnar. Marginalirnir verða so smáir, tá ið tað gongur soleiðis. Tá ið tú ikki fært mál sjálvur, so rakar tað meint, tá ið mótstøðuliðið skorar eina ferð, og tað mugu vit rokna við, at teir fara at gera viðhvørt, sjálvt um verjuskipanin riggar heilt væl hjá okkum, heldur John Christensen.

VB hevur fingið trý mál ímóti sær. ÍF og GÍ hava skorað í Vági, og KÍ fekk mál í Klaksvík, tá ið teir gjørdu nyttu burturúr óneyðugum brotssparki.

*Hvat ætla tit at gera við henda trupulleikan?*

- Vit fara at venja so miðvíst, sum vit hava gjørt higartil. VB hevur teir útlendingarnar, sum hava loyvi at spæla við, og tað er ivasamt, um tað finnast góðir málskjúttar, sum ikki longu spæla. Eg havi álit á teimum, sum eru á liðnum, og eg veit, at teir gera teirra besta. Í felagi vóna vit, at tað næstu ferð verður nóg mikið.